gult cyan magenta svart



Landsst‡risma›urin í samfer›slumálum:

# Vil avtaka Skálafjar›arlei›ina

**Ta› gevur eitt hall á 11 túsund krónur um dagin at sigla vi› Ternuni I millum Skálafjør›in og Havnina. Harafturat má n‡tt skip útvegast, skal lei›in halda fram. Tí vil landsst‡risma›urin í samfer›slumálum hava lei›ina avtikna**

SAMFER‹SLA
*John Johannessen*

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í samfer›slumálum vil hava løgtingslógina um fólka- og farmaflutning broytta, solei›is at Strandfer›slan kann gevast at sigla millum Skálafjør›in og Havnina.

Orsøkin til hetta er, at lei›in er alt ov kostna›armikil. Halli› av lei›ini er 11 túsund krónur um dagin, og harafturat er Ternan I vor›in so gomul, at ney›ugt er vi› íløgu í eitt n‡tt skip, skal lei›in halda fram.

### Fingi› bo› at spara

Landsst‡risma›urin í samfer›slumálum vísir á, at hann hevur ein ógvuliga avmarka›an karm. Hann hevur fingi› bo› at spara har, hann kann. Tí heldur hann, at ta› er rætt at spara hesa lei›ina burtur, tá ta› kortini ber til at koyra ímillum Skálafjør›in og Havnina.



*Skal Skálafjar›arlei›in halda fram, er ney›ugt vi› stórum íløgum. Tí heldur landsst‡risma›urin vi› ábyrgdini fyri siglingini, at ta› er skilabest at avtaka lei›ina*

– Lei›in gevur stórt hall, sum hon er nú, og harafturat er sta›fest, at Ternan I skal umbyggjast fyri í minsta lagi 6 milliónir krónur næsta ár, skal hon lúka altjó›a krøv, sigur Bjarni Djurholm.

Samstundis vísir Bjarni Djurholm á, at Ternan I er meira enn 40 ára gomul, og tí er ta› ikki serliga skilagott at umvæla hana fyri so stóra upphædd.

– Skal lei›in halda fram, hava vit tríggjar møguleikar. Tann fyrsti er at leiga eitt skip til lei›ina. Hetta kemur at kosta 8 milliónir árliga. Næsti møguleikin er at keypa eitt brúkt skip til lei›ina. Hetta kemur at kosta millum 10 og 20 milliónir. Tri›ji møguleikin er at byggja eitt skip. Hetta ver›ur ein íløga á millum 40 og 60 milliónir krónur, vísir Bjarni Djurholm á.

### Tveir møguleikar

Hetta, Heldur Bjarni Djurholm, gevur løgtinginum tveir møguleikar. Ta› kann velja at broyta løgtingslógina fyri fólka- og farmaflutning, solei›is at lei›in ver›ur ni›urløgd. Ella kann ta› velja at játta pening til at keypa n‡tt skip til lei›ina.

– Eg mæli til, at lei›in ver›ur avtikin. Tí samsvar er ikki ímillum ta›, sum ta› kemur at kosta at var›veita lei›ina og ta›, sum fæst burturúr, sigur Bjarni Djurholm.




Javnaðarflokkurin
-reyði tráðurin í føroyskum politikki
Frælsi
Javnaður
Brøðralag

**Vágbingar velja lista C**



Jónleif Augustinussen
Páll Augustinussen
Evald Bech
Kirstin Strøm Bech
Elitha Hjelm
Marius Kjærbæk
Petur Ludvig
Eyðfinn Mørk
Atli Poulsen
Torkil Strøm
Esther Suðuroy
Niclas Thomassen

Menniskjað í miðdepulin

Við einstaka borgaranum í miðdeplinum fer Javnaðarlistin í Vágs býráð at føra ein politikk, sum setur trivnaðin og vælferðina í hásætið.

Okkara fremsta mið og mál er, at í Vágs kommunu skal vera gott at búleikast hjá øllum borgarum.

Vit fara at leggja dent á at tryggja borgarunum jøvn demokratisk rættindi og menna tær kommunalu tænasturnar.

Fyri at náa hesum málum er brúk fyri politikarum, sum bæði duga og tora at taka upp dagsins mál,

samstundis sum hugburðurin um tað góða samfelagið ikki verður mistur burtur.

Vit fara at virka fyri at

- gera tað liviligari hjá borgarunum við støðugt at lækka skattaprosentið
- gera tað liviligari hjá familjum við børnum
- hækka barnafrádráttin
- barnagarður verður settur á stovn

Øll størri arbeiði hjá kommuni verða bjóðað út, so mest fæst fyri borgarans skattapening

Havnaútbyggingin skal fremjast so

- vinnuvirki við havnina sleppa at byggja út
- størri skip sleppa til bryggju — landið skal luttaka í hesi útbygging

Eitt blómandi vinnulív og nógv arbeiðspláss, er ein lívstreyt, men kanningar vísa, at skal ein kommuna vaksa og fólk trívast, so er neyðugt,

at lokalsamfelagið t.v.s. kommunan hevur nøkur tilboð at bjóða borgaranum.

Tí skal dentur verða lagdur á at stuðla allari mennandi mentan í kommuni, bæði ítrótt, tónleik, leiklist,myndlist o.a.

Farið fjølment á væl og veljið ein sterkan Javnaðarlista til býráðsvalið

X við lista C


# Ane Læsø skal avloysa

SAMFER‹SLA
*Ey›un Klakstein*

Strandfer›sluskip Landsins gjørdu í gjár ein leigu-sáttmála um avloysaraskip til Lorvíksfjar›alei›ina.

Skipi›, sum næstu vikurnar skal røkja sambandi› millum Klaksvík og Lorvík, eitur Ane Læsø, og ver›ur leiga› frá Færgeselskabet Læsø. Avtalan er galdandi fram til 7. desember, tá ætlanin er, at Dúgvan skal setast í sigling aftur.

Ane Læsø er naka› styttri enn Dúgvan, men brei›ari. Hon tekur 34 bilar og 389 fer›afólk.

Í løtuni røkir gamla Ternan siglingina um Lorvíksfjør›, og Smyril ger eisini ein túr um dagin millum Klaksvík og Havnina.

Í løtuni ver›ur Ane Læsø rigga› til at sigla til Føroyar, og ætlanin er, at hon skal setast í sigling um nakrar dagar.




*Hetta er skipi›, sum skal røkja siglingina um Lorvíksfjør› til Dúgvan aftur fer í sigling*



# Velji› kvinnur



*Bergtóra Hanusardóttir heldur at møguleikin fyri at fleiri kvinnur ver›a valdar hesafer› er lítil*
Mynd: Jens Kr. Vang

**Bergtóra Hanusardóttir, forkvinna í Kvinnufelagnum, seg›i á kvinnupolitiska fundinum fríggjakvøldi›, at ta›, sum valevnini førdu fram, ljó›ar fínt og gott, men trupulleikin er bara, at alt ov fáar koma inn í b‡rá›i›**

KVINNUR Í POLITIKKI
*Stefan í Skorini*

Kvinnufelagi› skipa›i fríggjadagin fyri kvinnupolitiskum fundi á gamla Meiarínum. Kvinnulig valevni úr øllum flokkunum vóru vi› á pallbor›sfundinum. Slagor›i› til hetta b‡rá›svali› er: Velji› Kvinnur! Kvinnur duga! Kvinnur tora! Velji› Kvinnur!

### Kanónirnar ikki vi›

Vi› seinasta val vór›u bara tríggjar kvinnur valdar inn í b‡rá›i›. Bert tann eina av teimum hevur valt at bjó›a seg fram enn einafer›. Elin Lindenskov er framvegis valevni, eftir at hon var› vald í 1992. Hvørki fyrrverandi borgarstjórin, Lisbeth Petersen, ella Katrin Dahl stilla uppaftur til hetta b‡rá›svali›.

Lisbeth Petersen hevur veri› í b‡rá›num sí›an 1984, og er hon tann kvinnan, sum hevur siti› longst í b‡rá›num, harav f‡ra ár sum borgarstjóri. Lisbeth er í løtuni løgtingslimur fyri Sambandsflokkin. Katrin Dahl hevur veri› b‡rá›slimur sí›an 1988 fyri Fólkaflokkin, men hon velur heldur ikki at stilla uppaftur.

Útlitini, fyri at fleiri kvinnur ver›a valdar í Havn hesufer›, eru tískil ikki serliga gó›, tí n‡ggju valevnini eru ikki eins kend og Katrin Dahl, Lisbeth Petersen og a›rar.

– Valevnini vístu á fundinum, at tær eru dugnaligar, leggja dent á at gera eitt gott arbei›i og royna at byggja upp. Fleiri av teimum hava uppibori›, at koma longri enn líkt er til at tær sleppa, sum stø›an er nú, tí tær eru so ókendar, sigur Bergtóra Hanusardóttir.

– Trupulleikin er, hvussu vit fáa kvinnur valdar, tá tær, sum eru valdar fyrr, ikki stilla uppaftur. Man kann vera bangin fyri, at fólk als ikki vita, hvussu vánalig stø›an í veruleikanum er.

– Ta› eru nøkur ting, sum kvinnur ra›festa hægri enn menn, og ta› ver›ur ikki umbo›andi sum demokrati, um ikki bá›ir partar eru umbo›a›ir, sigur Bergtóra.

### Eingin kvinnulisti

Í ár eru 22 kvinnulig valevni á listunum í Havn. Samanbera vit vi› 1984, tá ein kvinnulisti var› at seta krossin vi›, vóru 40 kvinnulig valevni. Hetta má sigast at vera ein stór afturgongd, og møguleikin fyri størri kvinnuligari umbo›an í b‡rá›num er tí ikki betra›ur.

Ta› kann vera ein trupulleiki at fáa kvinnur at bjó›a seg fram, tí eitt av valevnunum seg›i á fundinum, at flokkurin hev›i heitt á 40 kvinnur um at stilla upp, men at allar høvdu bori› seg undan.

Beinta í Jákupsstovu hev›i framløgu á fundinum, og hon seg›i, at vandi er fyri, at menn fáa ágó›an av teimum atkvø›um, sum kvinnur geva kvinnuligum valevnum, sum ikki ver›a valdar inn.

Í 1980 og 1984 var ein kvinnulisti til b‡rá›i›, men kom onganntí› inn. Í 1984 vanta›u sjey atkvø›ur í at fáa umbo›an. Sí›an n‡ggja vallógin var› sett í gildi í 1972, eru bara f‡ra kvinnur valdar í b‡rá›i›, og eru ta› Lisbeth Petersen, Kristianna Rein, Katrin Dahl og Elin Lindenskov. Bara ein av hesum stillar upp hesufer›.

– Trupulleikin er, at kvinnur enn halda, at tær hava betri møguleika í teimum vanligu flokkunum enn á einum kvinnulista, og tí hava vit ongan kvinnulista, sigur forkvinna Kvinnufelagsins.



*Kristianna Rein var or›st‡rari á fundinum og hon hev›i ikki trupulleikar vi› at halda skil á tí›ini*
Mynd: Jens Kr. Vang

### Kvinnur sum ífylla

Brei› semja var millum luttakararnar, at kvinnur eru alt ov illa umbo›a›ar í politikki og lei›andi størvum sum heild. Eitt, sum kom fram á fundinum, var, at kvinnur eiga at velja kvinnur. Solei›is hev›i b‡tti› av b‡rá›slimum sjálvsagt veri› meira javnt millum kynini.

Beata L. Samuelsen leg›i í sínari framløgu dent á, at allar kvinnur eiga at standa saman uttan mun til, hvønn politiskan flokk tær hoyra til. Hesum tóku fleiri undir vi›, men ta› kann vera trupult, tá man er limur í eini samgongu.

Eisini var› sagt, at fleiri av kvinnuligu valevnunum føldu seg sum ífyllu á listunum bara fyri at hava kvinnur vi› á listanum.

– Flokkarnir taka ikki kvinnurnar í nóg stórum álvara og stu›la teimum ikki solei›is, at tær kunnu ver›a valdar inn. Har svíkja flokkarnir, sigur Bergtóra.

Kvinnuliga umbo›anin í politikki sum heild í Føroyum er bara um tey 10 prosentini.

Útlitini eru kanska døpur, men enn er ikki ov seint. Velji› Kvinnur.

# Amnesty International í Nor›urlandahúsinum

KONSERT
*Sunneva Háberg Eysturstein*

Sunnukvøldi› kl. 16.00 helt Amnesty International konsert í Nor›urlandahúsinum.

Kularrøtur, vi› kendu sangaranum, Jógvan Hansen úr Aria, og ársins songrødd, Arnfrí› Lützen, spældi barna- og ungdómssangir.

Høli› var fult, og gó›ur h‡rur var. Nógvar barnarøddir vóru at hoyra, tá mest umtóktu sangirnir hjá Kularrøtum vór›u spældir. Eisini børn úr fólkaskúlum sungu fyri ásko›arunum.

Tiltaki› var› hildi› til stu›ul fyri Amnesty International, sum er eitt felag, i› stendur fyri einstøk mannarættindi.





VETRARTILBOÐ við Norrönu





Bilpakkar Føroyar - Danmark ella hinvegin

| | 4-koyggju kamar v. wc/bað | 2-koyggju kamar v. wc/bað | Luksus kamar |
|---|---|---|---|
| Bilur + 4 fólk | 3.640,- | 4.620,- | 6.940,- |
| Bilur + 3 fólk | 2.920,- | 3.660,- | |
| Bilur + 2 fólk | 2.210,- | 2.700,- | 3.860,- |

Fyrsta fráferð er fríggjadagin 13. oktober.

Frítíðarbúðir/Summarhús:
Danland í 1 viku
úr 4.995,-
2 vaksin & 2 børn í bili
Dansk Folkeferie í 1 viku
úr 5.995,-

Hotel:
Hotel Excelsior í 1 viku - Keypmannahavn
úr 3.795,-
fyri hvønn, við 2 ferðandi í bilinum
Park Hotel í 1 viku - Ålborg
úr 3.350,-

team 85 · 31 65 11

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com